VIÐMERKINGAR

# Fyri at kunna arva mást tú fyrst vera føddur

Helgi Abrahamsen



Í Dimmalætting tann 6. september setti eg ein spurning til Stjórnarskipanarnevndina og Amnesty International, Føroya deild. Orsøkin til spurningin var, at forkvinnan í Amnesty International, Føroya deild, hevði verið alment frammi við eini áheitan á politikararnar um at taka rættindini hjá teimum samkyndu við í komandi stjórnarskipanarlóg, og formaðurin í stjórnarskipanarnevndini hevði sagt við Útvarp Føroya, at spurningurin skuldi takast upp í nevndini.

Eg spurdi tí, hvat Amnesty International og stjórnarskipanarnevndin hildu um fosturtøkuspurningin. Tí um tað er so umráðandi at fáa rættindi hjá samkyndum við í eina komandi stjórnarskipanarlóg, so er tað ikki annað enn náttúrligt, at tað eisini fær pláss í somu lóg, at frí fosturtøka skal ikki kunna vera loyvd í Føroyum. Tað kann ikki bera til, at spurningurin um kynsligan samleika, skal hava størri týdning í føroyskari løggávu enn rætturin til at verða føddur.

**Svarið frá Amnesty International**

Amnesty International, Føroya Deild svaraði spurninginum longu 8. september. Svarið er sakligt, og tað vísir, at hóast felagsskapurin hevur eina greiða støðu viðvíkjandi teimum samkyndu, so hevur hann í løtuni onga støðu til spurningin, um ein einsamallur føroyingur skal kunna taka avgerð um, hvørt ein annar føroyingur skal fáa loyvi til at verða føddur ella ikki. Amnesty vísir á, at spurningurin er viðkvæmur og samansettur, og tí má hann viðgerast nágreiniliga. Málið verður tikin upp á altjóða aðalfundi í 2007.

Hóast eg undrist á, at ein felagsskapur, sum hevur til aðalmál at stríðast móti øllum mismuni, onga støðu hevur til henda álvarsama spurning, har mismunurin er í hásæti, so gleðir tað meg kortini at frætta, at arbeitt verður við málinum, og eg takki fyri svarið.

Eg gangi út frá, at tá avtornar fer rætturin til at verða føddur at hava minst líka stóran týdning fyri Amnesty International, sum rætturin hjá samkyndum at arva hvønn annan, og at felagsskapurin til ta tíð fer at krevja, at hesin rættur eisini fær pláss í stjórnarskipanarlógini. Alt annað vildi verið púrasta burturvið.

**Svarið frá Stjórnarskipanarnevndini**

Formaðurin í Stjórnarskipanarnevndini svaraði spurninginum tann 21. september. Í svarinum sigur hann, at spurningurin um fosturtøku verður tikin upp til viðgerðar í Stjórnarskipanarnevnini, og tað er eitt svar, sum eg eri nøgdur við.

Nógv orka er løgd í arbeiðið at gera eina stjórnarskipanarlóg, og tað hevur stóran týdning fyri arbeiðið í stjórnarskipanarnevndini, at funnar verða orðingar, sum so stórur partur av Føroya fólki sum til ber (helst øll) kunnu taka undir við. Men eg kenni meg tættiliga sannførdan um, at tað at taka spurningin um skrásett paralag o.l. við í lógina, er tann vissi vegur burtur frá teirri breiðu semjuni. Men skal hesin spurningur kortini fáa pláss í stjórnarskipanarlógini, so verður eisini neyðugt at taka aðrar etiskar spurningar, sum til dømis fosturtøkuspurningin við.

Samanumtikið vil eg takka Amnesty International, Føroya Deild og formanninum fyri Stjórnarskipanarnevndini fyri, at tey vildu svara mínum spurningi, og at báðir partar siga seg fara at viðgera málið.

Eg vil fasthalda, at tað nyttar lítið at vinna rættindi til kynsligan samleika, vernd máti niðrandi úttalilsum og arvarætt, um tú ikki fyrst kanst fáa tryggjað tær rættindini til at verða føddur.

# Hjálpið manninum

Súsanna Dam



Høgni hevur aftur sýnt hvør dugur er. Hann ætlar at bjarga okkum, um tað er frá okkum sjálvum, donskum trælahaldi ella onkrum heilt øðrum er torført hjá mær at fáa greiði á.

Álvaratos, mær tykir so hjartaliga synd í manninum, hann stríðist og strevast av øllum alvi púra einsamallur ímóti ómetaliga illkynjaðum fíggindum. Ein fær nærum illgruna um at hesir fíggindar eru so listinlærdir, at teir allir sum ein, hava svorið at standa saman um, at forða Høgna. Sum nú til dømis, var eingin respekt, tá hann á sinni rættiliga álvarsliga smekkaði nevan í borðið á Christiansborg, eins og Kofi Annan heldur ikki sendi ST herin eftir Poul Nyrup, tá Høgni klagaði um ta vánaligu viðferðina honum hevði verið fyri av tí danska hjálandavaldinum. Og ikki minst hitt seinasta dømi, tá sjálvt drotning Margreta og hennara hov fara í part við donsku stjórnina fyri, sum Útvarp Føroya frambar tað, at dylja sum mansmorð fyri Høgna, hvør tað var, sum bað ella lokkaði drotningina til at umrøða eina politiskan sáttmála, sum bæði Føroya Løgting og Fólkatingið høvdu samtykt. Men Høgni hevur lovað, at hann gevst ikki her, hann fer at bora og bora, til hann hevur eitt svar, og tí er tað, eg vil siga: »Hjálpið manninum«.

# Stór oljufund skunda undir sjálvstýri

**– Verður stórt oljufund gjørt næsta summar, so fer tað at fáa stóra ávirkan á samfelagið. Eg føli meg sannførdan um, at kemur samfelagið at flóta við pengum frá oljuni, so er tað bara ein spurningur um tíð, til Føroyar taka seg úr danska ríkinum sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum**

OLJA OG BÚSKAPUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um so er at rakt verður við nógva olju næsta summar, so fer tað at hava positiva ávirkan á føroyska samfelagið. Hinvegin fer tað eisini at hava avleiðingar, sum vit politiskt skulu taka støðu til. Hetta sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, og hann heldur tað tí vera upplagt, at man politiskt slær kalt vatn í blóðið og ger skipaninar soleiðis, at tann peningur, sum kemur til samfelagið ikki fer til forbrúk og ikki verður brendur av frá ári til ár, men at gjørd verður ein langtíðarplanlegging um, hvussu oljupengarnir verða brúktir. Hetta verður neyðugt, ikki minst til at samfelagið er so viðbrekið.

Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at verður olja funnin næsta summar og hetta fer at hava við sær framleiðslu um nøkur ár, har peningur fer at streyma inn í landskassan, so er tað í fyrstu atløgu bara avkastið av inntøkunum vit skulu brúka. Og uppgávan hjá politikarunum er tá at fordeila oljuinntøkurnar, so tær eisini koma komandi ættarliðum til góða.

**Stóra ávirkan á samfelagið**

Bjarni Djurholm, sum hevur umsitið oljumál í landsstýrinum, síðani nýtt landsstýri varð skipað, ivast ikki í, at eitt møguligt oljufund næsta ár fer at fáa eina ótrúliga ávirkan á samfelagið. Inntøkurnar koma ikki beinanvegin, men ringvirkningarnir frá einum øktum virksemi koma at gera, at samfelagið fer at hava ríkiligt við pengum. Hann vísir á, at tað krevur so aftur breiðar herðar at bera góðar tíðir. Vit mugu tí ansa eftir, at samfelagið ikki fer á glið. Men slíkur útviklingur fer so eisini at skapa heilt nýggj perspektiv leggur hann aftrat.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum: – Vit mugu fordeila oljuinntøkurnar soleiðis, at tær eisini koma komandi ættarliðum til góða.*

Uppá fyrispurning í hvønn mun landsstýrið hevur kalkuerað við oljuinntøkum sum part av verkætanini 2015 sigur hann, at landsstýrið kalkulerar ikki við oljuni í hesi ætlan. Tað roknar við, at samfelagið fer at klára seg við tí tilfeingi, sum samfelagið hevur í dag og ikki minst teimum menniskjansligu. Men finna vit olju, so verður tað nakað, sum kemur aftrat.

**Olja skunda undir sjálvstýri**

– Fara vit at gerast sjálvstøðug tjóð ella fullveldi skjótari, um olja verður funnin í stórum nøgdum?

– Avtalan við danir kring okkara skuld til danska statin sigur greitt, at í teirri løtu føroyingar fáa inntøkur frá møguligum oljukeldum, so skulu tær fyrst mótroknast í tí skuld vit hava og harnæst mótroknast í blokkinum, so tað er eingin ivi um, at tær fíggjarligu bindingarnar millum Føroyar og Danmark koma at svinna burtur frá løtu til aðra, um stórar oljukeldur verða funnar við Føroyar. Hvat man so annars ger politiskt, skal so ein fólkaatkvøða avgera. Henda samgongan hevur lagað tað so, at tað er Føroya fólk sum til eina og hvørja tíð suverent tekur ta avgerðina. Finna vit olju, so fer tað at skunda undir sjálvstýrisprosessina.

Av og á stingur kjak seg upp um, hvørvítt føroyingar veruliga eiga ráevnini í undirgrundini. Bjarni Djurholm er sannførdur um, at føroyingar hava fullan rætt til ráevnini í undirgrundini.

– Vit hava eina avtalu við danska statin um, at vit hava myndugleikan yvir ráevnum í undirgrundini, og alt annað er eitt akademiskt tjak. Eg føli meg sannførdan um, at kemur samfelagið at flóta við pengum frá oljuni, so er tað bara ein spurningur um tíð, til Føroyar taka seg úr danska ríkinum. Tað liggur so ein púra greið avtala um tað. Henda samgongan hevur lagt lunnar undir ta skipanina, at tá ið føroyingar vilja taka fullveldi, so verður tað gjørt við eina fólkaatkvøðu.